# HEILSANIR

**Góða fitta Ranja**
Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 27. august. Jesus pápi signi framtíð tína. Nógvir mussar og klemm. Vit elska teg.
**Mamma og babba**





Hesin maðurin verður 75 í morgin. Hvør skuldi trú tí? Allarbesti abbi, hjartaliga tillukku við degnum. Takk fyri alt, tú ert fyri okkum. Ein serlig tøkk fyri allar biltúrarnar til Gjáar og suður á rundkoyringina.
**Heilsan Jóna og Pætur**



**Góða Manja**
Hjartaliga tillukku við degnum 25. august.
**Heilsan vit í Grannatúni**



**Góða allarbesta Ranja**
Eg vil ynskja tær hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 27. august. Tú er tann allarbesta og fittasta lítlasysturin í verðini. Her hugna vit okkum ordiliga nógv. Beiggi elskar teg.
**Teitur**

**Góða Maria**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum í morgin. Alt gott ynski eg tær.
**Kærar heilsanir mamma**





**Góða pabba**
Hjartaliga tillukku við 40 ára degnum. Tú er tann besti pabba í allari verðini. Muss og klemm.
**Heilsan Heiðrun**



**Góða Maria**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum í morgin. Alt gott ynski eg tær.
**Kærar heilsanir Niels**



**Ársins sjógangarar 2006**
Hjartaliga tillukku við Føroyameistaraskapinum,
**ynskja Fjeppararnir**



**Gummu´sa prinsessa**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Nú er tú stór, men tú verður altíð gummu´sa lítla prinsessa. Eisini ein heilsan til beiggja.
**Heilsan lítla gumma**



**Góða Maria**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum. Her situr tú gott og etur døgurða. :)
**Bestu ynskir Anna og Tóri**

**Góði fitti Rói**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum 27. august. Vit elska teg.
**Bestu heilsanir omma og abbi í Geilini**





**Góði pápi og abbi**
Hjartaliga tillukku á 75 ára degnum 26. august. Takk fyri alt, sum tú og omma eru fyri okkum.
**Heilsan vit øll**

**Góða Manja fastur**
Hjartaliga tillukku við 40 ára føðingardegnum, eri so góður við teg. Alt tað besta frá okkum.
**Ynskir Jan**



### 95 ára føðingardagur
Mikudagin 30. august fyllir Dora Nielsen á Vatnsoyrum 95 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Vágum frá kl. 17.00-21.00. Øll eru vælkomin.

### 90 ára føðingardagur
Mikudagin 30. august verður Brynhild Kirk, ættað úr Oyndarfirði, búsitandi í Esbjerg. 90 ár.

Mikudagin 13. september verður Adolf Rubeksen 90 ár. Dagurin verður hildin á Lágargarði frá kl. 18.00-21.00. Tey, ið vilja gleða Adolf við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 31. august á tlf. 317991.

### 80 ára føðingardagur
Hósdagin 31. august fyllir Mathilda Joensen í Líðini í Vági 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### 70 ára føðingardagur
Mikudagin 30. august fyllir Ásmund Hansen, Æðuvík 70 ár. Dagurin verður hildin í Sjókaféini leyugarkvøldið 2. september kl. 18.00. Tey, ið vilja koma, verða vinarliga biðin at siga frá á tlf. 448571 áðrenn 25. august.